## Skúlin við Løgmannabreyt hevur fingið varaskúlastjóra

**Hans Jón Thomsen er settur sum varaskúlastjóri í Skúlanum við Løgmannabreyt**

Frá 1. august 2009 er Hans Jón Thomsen, Tórshavn, settur sum varaskúlastjóri í Skúlanum við Løgmannabreyt.

Hans Jón er 35 ára gamal. Hann tók læraraprógv á Aalborg Seminarium í 1998 og hevur nomið sær eftirútbúgvin í leiðslu og ráðgeving.

Hann hevur arbeitt sum lærari og ráðgevi í Føroyum og í Danmark m.a. á bústovnum fyri børn og ung við sálarligum og sosialum trupulleikum.

Síðan 2006 hevur Hans Jón Thomsen verið leiðari á NSR-tænastuni á Glyvrum.

## Program-leiðarin sagt upp

**Herluf Sørensen hevur lagt frá sær sum program-leiðari í Kringvarpi Føroya**

Ósemjurnar um leistin í Kringarpinum tykjast aftur hava kostað enn ein leiðarasess.

Hesa ferð hevur Herluf Sørensen sagt upp sum program-leiðari.

Við Dimmalætting sigur Herluf Sørensen, at hansara persónligu virði og tey hjá leiðsluni ikki sampakka nóg væl, og at hetta er orsøki til uppsøgnina.

Hann leggur tó afturat, at hóast hann gevst sum program-leiðari í Kringvarpinum, merkir hetta ikki, at hann fer úr stovninum. Ístaðin verður hann nú verkætlanarleiðari.

# Finnbogadóttir verjir Saltsiloætlan



Fyrrverandi íslendski forsetin, Vígdis Finnbogadóttir hevur játtað at vera verji hjá tí stóru verkætlanini. Í práti við Rás2 í dag, greiddi ein av stigtakarunum aftanfyri verkætlanina, Saltsiloprojektið, Òlavur Rasmussen frá, at Saltsiloprojektið hevur fingið ein altjóða kendan protektor - verja. Talan er um ongan minni enn fyrrverandi íslendska forsetan, Vígdis Finnbogadóttir, sum var forseti Íslands, árini 1980-1996, sum hevur játtað at vera protektor fyri Saltsiloprojektinum. Vígdis Finnbogadóttir vitjaði eisini í Suðuroy, tá hon var á almennari vitjan í Føroyum í 1987. Stigtakarnir fegnast um, at tað hevur eydnast at fingið ein slíkan altjóða kapasitet til at vera verji hjá verkætlanini. Stigtakarnir vóna, um alt gongur væl, at Saltsilo´in í Trongisvági kann standa klár sum mentannarhús fyri allar føroyingar í 2013 ella 2014. Ágóðin frá Jóansøkufestivalinum, sum verður um vikuskiftið fer óskerdur til saltsiloprojektið.

**- Heris**


TÆNASTUR TIL SALARSJUK HEILSU- OG SJUKRARØKT
VIRKNISHÚS VARDIR VERKSTAÐIR HEIMARØKT ELDRASAMBÝLI
UMLÆTTINGARSTOVNAR RØKTARHEIM SAMBÝLI FYRI MENNINGARTARNAÐ
BÚSTOVNAR DAGTILHALD HEIMAHJÁLP ØKISTERAPI



**500 milliónir krónur**

Nýggi fíggjarstjórin í Nærverkinum skal stýra hesari upphædd.
Er tað tær, vit leita eftir?

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 36 00 00, Faks 36 00 01, naerverk@naerverk.fo

**500 mió. krónur, sum skulu fíggja eldrasambýli, rakstur av røktarheimum, heimarøkt, sambýli fyri menningartarnað, vardar verkstaðir, tænastur til sálarsjúk og lønarútgjaldingar til øll 1400 starvsfólkini, ið starvast kring alt landið. 500 mió. krónur, sum skulu stýrast við største hegni og nærlagni.**

**Arbeiðsøki**
Fíggjarstjórastarvið er eitt nýuppræ̈ttað starv í Nærverkinum. Sum fíggjarstjóri hevur tú beinleiðis tilvísing til Mary í Garði, stjóra, og tú verður partur av leiðslutoyminum.

Fíggjarstjórin fær ein stóran leiklut í almennu vælferðini. Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum.

Títt arbeiðsøki verður avbjóðandi og víttfevnandi. Tú skalt kunna hava nógvar bóltar í luftini í senn. Og tú skalt duga at halda høvdið kalt, tá á stendur.

Uppgávurnar spenna allan vegin frá fíggjarlógararbeiði, fíggjarstýring og framrokningum til ráðgeving og vegleiðing internt og eksternt og íverksetan av broytingum og nýggjum tiltøkum.

Tú fært dagligu ábyrgdina av fíggjar-, roknskapar- og lønarviðurskiftunum í Nærverkinum. Fíggjarstjórin skal taka sær av umsiting av rakstrargøgnum og felags innkeypi. Og tað verður tú, ið skal samráðast um rakstraravtalur og keypsáttmálar og umsita hesi.

Játtanin til Nærverkið telist millum landsins størstu. Tað krevur hollan fíggjarligan kunnleika. Góð samstarvsevni eru neyðug, tí kábalin skal ganga upp.

Við uml. 1400 starvsfólkum er Nærverkið Føroya størsta arbeiðspláss. Nærverkið er ein landsstovnur, og fíggjarstjórin kemur at hava sítt dagliga arbeiðspláss á Meginskrivstovuni, ið liggur á Argjum.

**Vit vænta, at tú hevur:**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. cand.polit., cand.merc. ella cand.oecon.
- Viðkomandi starvsroyndir innan fíggjarviðurskifti
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- KT-kunnleika
- Hollan málsligan førleika

**Setanarviðurskifti:**
Setanarøkið er Nærverkið umframt Almannamálaráðið við stovnum. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins, umframt 15% í eftirløn, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála. Tann, sum sett/-ur verður, má tola broytingar í starvsinnihaldinum.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Send umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum til:

**Nærverkið**
Stílað:
Mary J. í Garði, stjóri
Argjavegur 26, Postsmoga 3037
110 Tórshavn

Vilt tú vita meira um starvið, skalt tú venda tær til Mary J. í Garði, stjóra á tel. 36 00 00.

**Umsóknarfreist:**
Fríggjadagin 10. juli 2009.

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

sansir.fo

www.naerverk.fo